*Frá Felagnum fyri kirkjuráðslimir*

# Vilja hava fleiri urguspælarara

Í kirkju okkara kunnu vit gleðast um arbeiðið, sum allir kirkjutænarar gera í trúfesti, ár út og ár inn. Fyri at henda tænasta ikki skal vera alt ov bindandi fyri tann einstaka, verður mangastaðni roynt at finna fleiri at røkja hana.

Men at spæla urgu krevur førleika, sum ikki er líka vanligur millum manna, sum neyðugi førleikin at vera klokkari ella deknur. Tí hevur ofta verið serliga torført at finna urguleikara. Eisini á hesum øki er nú vón fyri stavn. Summastaðni hava kvøldskúlar í nøkur ár havt undirvísing í urguspæli, eitt nú í Havn og á Tvøroyri, men í samstarvi við kvøldskúlarnar kring landið hevur tað í ár verið møguligt at skipa skeið í urguspæli at kalla um alt landið:

*Norðuroyggjar:* Jóhanna Johannesen, Klaksvík
*Eysturoy:* Heðin Kambsdal, Fuglafirði
*Streymoy:* Oddvør Johannesen, Tórshavn
*Vágar:* Martin Pollard, Sandavági
*Sandoy:* Wilhelmina Larsen, Dali
*Suðuroy:* Jens Mortan Mortensen, Hvalba

Nú er tað vón okkara, at bæði verandi urguleikarar, sum meta seg at hava tørv ella nyttu av tí, nýta høvið at gerast enn betur, og onnur áhugað fyri urguspæli og kirkjutónleiki somuleiðis halda seg framat.

Hjá mongum – ikki minst skúlaungdómi ella lærlingum, sum ynskja at taka lut – kunnu ferðaútreiðslur í sambandi við undirvísing ella luttøkugjald kennast sum týðandi eykaútreiðsla. Í slíkum føri hava kirkjuráðini høvi at hjálpa næmingum, sum taka lut við kirkjuspæli fyri eyga.

# Eystankórið

*byrjar venjingar sínar aftur nú hóskvøldið*

Í kvøld, 19. okt. kl. 20 byrjar Eystankórið aftur venjingar sínar í Glyvra Skúla undir leiðslu av Símun Nónklett. Umframt føroyskar og útlendskar sangir fer kórið undir venjingar av verkinum *Blest pair of Sirens* av C. Hubert H. Parry og Milton, sum ætlanin er at framføra í Fríðrikskirkjuni í febr. ella mars næsta ár. Í tí sambandinum hevur kórið tørv á royndum sangarum, bæði altum, sopranum, tenorum og bassum.

Síðsta vikuskifti í okt. er ætlanin at hava konsert saman við Ljómi og Vestmanna Sangkóri í Vágs kirkju. Eisini verða gjørdar fyrireikingar til eina noregsferð í juni at vitja kórið Oster Blandakor, sum var og vitjaði Eystankórið í summar.

Nýggir sangarar, sum hava hug at vera við í kórinum, eru vælkomnir. Møtið upp nú hóskvøldið í Glyvra Skúla.

*Tíðindaskriv frá*

# Undirvísingar- og mentamálastýrinum

Boðað verður við hesum frá, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur sett Susonnu Høgh Olesen av Tvøroyri í starv sum deildarleiðari fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar frá 1. januar 2001 at rokna.

Susanne Høgh Olesen er 42 ára gomul. Í 1980 tók hon prógv sum sjúkrahjálpari á Frederiksborg Amts sjúkrahjálparaskúla, og í 1994 tók hon prógv sum sjúkrasystir á Frederiksborg Sjúkrasystraskúla. Umframt hetta hevur hon tikið ymisk skeið innan sjúkrarøktarøkið.

Susanne Høgh Olesen hevur starvast sum sjúkrahjálpari í 16 ár, og sum sjúkrasystir tey síðstu trý árini, harav tað síðsta árið hevur verið á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi. Hon hevur verið við í ymsikum verkætlanararbeiði innan sjúkrarøktarøkið, og hevur verið virkin innan ymiskt felagsarbeiði á skúlaøkinum, so sum sitið í skúlastýrinum. Susanne Høgh Olesen hevur harafturat undirvíst sjúkrahjálparum og sjúkrahjálparanæmingum í 11 ár.

## Viðmerkingar:

# Framskygdar íløgur

Fyribyrging er framskygd íløga, men samansett øki at raðfesta. Nøkur siga fyribyrgingina hava spælt fallit. Tað er ikki rætt, men tað kann gerast betur. Ein fyribyrgdur trupulleiki sæst sjálvandi ikki. Tað kann verða ringt at fáa játtan »til einki«. Trúvirðið spolerast eisini av lítið virksomum tiltøkum. Alt er sjálvandi ikki svart/hvítt, men kanningar uttan uppfylging og problemloysing nytta lítið.

Primær fyribyrging er at nýta orku til ikki komnar hendingar, sum endamálið er at útseta ella sum helst als ikki skulu koma. Sekundær fyribyrging snýr seg um trupulleikar, sum verða hildnir niðri í álvarsemi og fyri at teir ikki skulu koma aftur.

Tað eru góðar grundir til at skjóta upp eina framskygda økisterapi. Eina verkætlan, sum eftirhondini verður ment við nógvum streingjum. Londini uttan um okkum hava fyri langari tíð síðani byrjað líknandi veitingar til sínar borgarar. Í londum, sum vit samanbera okkum við, er økisterapi eitt ábyrgdarøki hjá kommununum.

Býtið av eldraøkinum millum land og kommunur er í løtuni á dagsskrá hjá okkum. Vónandi vilja luttakararnir í bólkinum, sum viðgera málið, taka hetta brævið í álvara. Økisterapi eigur at fevna um allar aldrar og samfelagsliga víða. Smábørn, skúlabørn, vinnulívið umframt sjálvandi eisini tarnað og tarnaðarhótt í øllum aldri. Vónandi fær Tórshavnar Kommuna sítt eldraøkið at umsita og at neyðugu pengarnir sjálvandi fylgja við. Men framskylgdu íløgurnar mugu ikki steðga har.

**Jónas Johnsson,**
**valevni hjá**
**Sjálvstýrisflokkinum**

# Kollafjørður hevur tørv á útstykkingum til sethús



Ein kommuna hevur ymiskar uppgávur. Ein av teimum, sum eg her vil taka fram, er tann at virka fyri at ungfólk hava møguleikar at seta búgv.

Vanliga hevur kommunan her verið við tá økir blivu útstykkjað. Kommunan hevur gjørt økið búgvið og síðan selt stykkir, sum skulu byggjast á innan rímuliga tíð.

Í Kollafirði eru nakrar kommunalt fyriskipaðar útstykkingar. Hesar eru nú stórt sæð fult bygdar. Tí verður neyðugt at fáa nýggj øki til sethús. Hetta verður so ein uppgáva hjá komandi býráð at vera við í.

Eitt, sum eisini nokk má takast við, er, er at íbúðarmynstrið broytist – eisini í Kollafirði. Ein komandi útstykking kundi havt møgleika fyri sambygdum húsum – tvey ella fleiri. Eisini húsum, sum eru egnað til eldri at kunna yvirtaka í staðin fyri tey kanska í so stóru, tey sita við í dag og sum fella teimum so tung at halda. Hesin møguleiki eigur eisini at vera við í komandi ætlanum.

**Terje Davidsen,**
**valevni á sambandslistanum til**
**Tórshavnar býráð**

# Jazz, yes



Tórshavnar **Jazz Fólka & Blues Festivalur** hevur ein sera stóran týdning fyri Havnina. Umframt tað stóra tónleikarliga innihaldið hevur stevnan nógv at siga fyri vinnulívið og ferðamannavinnuna í Tórshavn. Í hesi skjótt nógvu árini vit eru ríkaði við hesari stevnu koma nógv nøvn fram fyri ein : **Cornelius Wreswick, Sven Bertil Taube, Kim Larsen, Bjørn Afzelius, Hanne Boel**, og øll hini næstan **2000 listarfólkini** sum hagartil hava verið við á hesum stevnum og sum hava havt eina stóra kveikjandi ávirkan á okkara føroysku tónleikarar og gospelsangarar.

Tað er tí sera **ørkymlandi** at hoyra at **Norðurlandahúsið** hevur í umbúna at broyta Jazz stevnuna. Hetta kann Havnin og Býráðið **ikki lata sær lynda** !

Komandi Býráð eigur aktivt at stuðla framhaldi av hesari stevnu sum ídag er ein **partur** av okkara **mentunarlívi** og **handilslívi** og sum **skal og eigur** at **halda fram** og **mennast** í mong ár afturat.

**Johan Mortensen**
**Valevni til Býráðsvalið**
**fyri Tjóðveldisflokkin**

# Vælkomin Kollafjørður



Nú Kollafjørður og Havnin fara í kommunufelagsskap verða nógvar uppgávur, sum vit skulu loysa í felag.

Fólkaflokkurin hevur altíð verið fúsur til at lagt lunnar undir føroyskt vinnu- og mentanarlív. Fyrsti formaður floksins var Jóannes Patursson – eitt menniskja, sum skaraði framúr alt lívsskeið sítt og hvørs navn stendur skrivað í Føroya søgu fyri allar tíðir.

Fólkaflokkurin vil vera við til at skapa eitt gott samstarv í høvuðsstaðarøkinum. Ein triðingur av Føroya fólki býr her og umráðandi er at vit skapa øllum eitt so gott inntøkugrundarlag sum yvirhøvur gjørligt. Hetta hevur týdning fyri allar Føroyar.

Fólkaflokkurin vil stuðla øllum, sum vilja skapa nakað her í høvuðsstaðarøkinum. Vit vilja stuðla teimum, sum vilja skapa arbeiðspláss, skapa inntøkur fyri Føroyar, økja um okkara kunningartøkni, skapa vinnu innan handverk og mangt, mangt annað.

Fyrsta fortreyt fyri at tosa um barnarøkt, eldrarøkt og aðrar sosialar trygdir er at vit hava eitt gott inntøkugrundarlag í høvuðsstaðarøkinum.

Hesum vilja vit virka fyri.

Vinarligast

**Bjarti Mohr,**
**valevni hjá**
**Fólkaflokkinum**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**



# Vilja hjálpa Føroyum at seta teir røttu spurningarnar

*-Tað er ikki neyðugt at uppfinna hjólið av nýggjum. Vit hava royndir og vitan, sum føroyskir myndugleikar kunnu fáa nyttu av, nú spakin verður settur í siga umboð fyri norska oljuráðgevarafyritøku, sum júst hava vitjað*



*Ein av ráðgevunum hjá Alliance Technoly greiðir frá um tilbúgving*

JAN MÜLLER

Nú oljuleitingin á landgrunninum nærkast verður meira og meira tosað um tilbúgvingina í Føroyum. Umframt at tað hevur skund at fáa eina veruliga tilbúgving fyri alt landið, so hevur tað kanska eyka skund at fáa tann partin av tilbúgvingini, sum hevur atlit til komandi oljuleiting, uppá pláss. Í farnu viku vóru umboð fyri norska felagið Alliance Technology á vitjan og skipaðu fyri ymsum skeiðum í Havn. Tað var Pauli Einarsson, fyrrverandi stjóri hjá Saga Føroyar, sum hevði tikið stig til at fáa norðmenninar henda vegin.

Norska fyritøkan kann bjóða vága- og tilbúgvingaranalysur og hevur sum virkisøki sítt serstakliga umhvørvi og arbeiðsumhvørvi. Hon bjóðar projektráðgeving innan hesar tættir, sum serstakliga hava við tilbúgvingarpartin av eini oljuvinnu at gera.

– Endamálið við hesi vitjan er at kunna føroyingar um hesar tænastur í sambandi við boring við Føroyar sigur Kjell Thorbjørnsen, umhvørvisráðgevi í felagnum. Hann vísir á, at teirra fólk hava drúgvar royndir frá arbeiði við operatørfeløg, myndugleikar og veitarar til oljuvinnuna.

Kjell Thorbjørnsen sigur, at tað í Føroyum finst førleiki og ekspertisa á nógvum økjum. Tá tað kemur til tilbúgvingina er spurningurin meira um at samankoyra teir ymisku partarnar.

Á skeiðunum í Havn samanbóru teir báðir norðmenninir Føroyar við Barentshavið og plássini í Norðurnoregi. Í báðum førum verður leitað eftir olju, og er her talan um havumhvørvi, ið er sera viðkvamt og um fólk, sum liva av tí havið gevur. Tvs. at oljuvirksemi í báðum hesum økjum fer at fáa stóra ávirkan á bæði umhvørvi og fólk.

Kjell Thorbjørnsen sigur, at tað er sera umráðandi, at føroyingar duga at síggja samanhangin millum virksemi til havs og á landi, og at man brúkar tær ressursir, sum eru á staðnum. Teirra íkast kann vera at leggja viðurskifti til rættis og hjálpa myndugleikunum at seta teir røttu spurningarnar til operatørarnar longu áðrenn virksemi tekur seg upp.

– Tað er ikki neyðugt at uppfinna hjólið av nýggjum. Vit hava royndir og vitan, sum føroyskir myndugleikar kunnu fáa nyttu av, nú spakin verður settur í.

Ein av teimum týdningarmestu spurningunum at seta oljuoperatørunum er, hvørjar skipanir teir hava sett í verk fyri at ganga føroysku krøvunum á møti – her við atliti til heilsu, umhvørvi og trygd. Hann vísir á, at tað er eisini ein stór avbjóðing fyri føroyskar myndugleikar at seta í verk intern krøv til operatørarnar.

### Altjóða ídnaður

Hvussu heldur Kjell Thorbjørnsen, at føroyingar eru fyrireikaðir til eina oljuvinnu?

– Hetta er ein nýggjur ídnaður, og tí vil tað vera rætt at seta teir røttu spurningarnar á fleiri økjum. Talan er um ein altjóða ídnað, sum bæði hevur fyrimunir og vansar, har lond hava ymsar lógir og ymisk sjónarmið. Fyri Føroyar er hetta nakað heilt nýtt, og eg haldi, at okkara vitan, kann verða virðismikil fyri føroyskar myndugleikar.

Richard Heyerdahl starvast eisini hjá Alliance Technology. Hann hevur arbeitt kring alla verðina í sambandi við oljuvirksemi. Hann heldur tað hevur alstóran týdning, at føroyingar gera sær greitt, hvør hevur ábyrgd av hvørjum. Hvør m.a. skal hava ábyrgdina av at fylgja upp virksemi eitt nú innan tilbúgving bæði á landi og til havs, við atliti til umhvørvi og heilsu. Tað er eisini týðandi at seta í verk skipanir fyri innanhýsis eftirliti bæði fyri feløg í Føroyum og at spyrja eftir innanhýsis eftirliti hjá feløgunum, sum ætla at seta seg niður her.

Richard Heyerdahl heldur tað er umráðandi, at føroyingar umframt at læra av royndum og mistøkum hjá øðrum eisini laga skipanir til føroyska samfelagið. -Tit eiga at taka hædd fyri teimum virðum, sum eru her. Tað eru fiskastovnarnar, náttúran og onnur virði, sum sermerkja føroyska samfelagið.

– Samskiftið millum myndugleikar og oljufeløg er eitt sera týðandi lið í allari gongdini. At bora eftir olju kann hava við sær „utslipp“, møguleiki er fyri vanlukkum bæði á menniskju og umhvørvi og tekniska útgerð. Tað setir krøv til samfelagið at vera væl fyrireikað. Ein slík fyrireiking byggir á, at tú hevur verið gjøgnum allar vandar og vandastøður og hevur fyrireikað føroyska samfelagið til at handfara hetta. Handfaringin snýr seg um forstáilsi, støðutakan og tekniskar møguleikar og fólk til at gjøgnumføra nakað.

Hann vísir á, at tað at seta røttu spurningnar er so eitt. Men at evaluera, tvs. at koma aftur til myndugleikarnar og gjøgnumføra eina ætlan, sum kann byggja upp eina framtíðar trygga og góða handfaring av hesum operatiónum, er eisini avgerandi fyri úrslitið.

– Sjálvsagt skulu krøv setast til operatørarnar, men hesir vísa ikki aftur slíkum krøvum, tí tað við tíðini er vorðið av alstórum týdningi í altjóða kappingingi at vera eitt felag, sum ongar vanlukkur hevur og uttan dálking sigur Kjell Thorbjørnsen, sum heldur størsta trupulleikan hjá føroyingum í dag vera manglandi samankoyring av ymsum pørtum av samfelagnum og at ábyrgdin ikki liggur nóg greið. Føroyingar eiga at hyggja meira eftir hesum við ábyrgd, planlegging, at seta ting í verk og upplæring. Hetta við hugburði og støðutakan hevur nógv at siga.

– Ein valukka t.d. kann kosta milliardir. So ein kann síggja, hvussu nógv kann sparast við at fyrireika seg væl og leggja dent á heilsu, trygd og umhvørvi sigur hann og endurtekur, at tað er týdningarmikið, at føroyskir myndugleikar seta síni krøv til hvønn einstakan operatør. Men har vita vit eisini, at operatørarnir sjálvir royna at hava hesi viðurskifti í lagi og royna at taka hædd fyri heilsu, trygd og umhvørvi, fyri at teirra egnu fólk og onnur virði verða væl røkt. Tað ræður um í felag at byggja nakað upp, sum er sermerkt fyri Føroyar, nakað, sum tekur hædd fyri júst hesum samfelagnum.



*Frá skeiðinum um tilbúgving í Havn í farnu viku.*

# Tilbúgvingin má raðfestast hægri

JAN MÜLLER

– Umráðini heilsa, trygd og umhvørvi hanga tætt saman, við tað at hendingar og tiltøk innan fyri eitt av hesum umráðum í stóran mun kunnu ávirka eitt av hinum. Tí er tað týdningarmikið at hyggja at HTU undir einum við mest møguligum felags ráðum og meginreglum fyri stýring sigur Pauli Einarsson, sum er ein av teimum føroyingum, sum hevur verið uppi í oljuvinnuni í rættuliga mong ár. Og eitt av málunum, sum hann hevur víst serstakan ans er nettupp spurningurin um heilsu, trygd og umhvørvi og her ikki minst spurningurin um eina føroyska tilbúgving, sum fevnir um allar tættir í samfelagnum og harímillum eisini eina komandi oljuvinnu. Pauli Einarsson tók sær av teimum báðum norðmonnunum frá Alliance Technology, sum herfyri hildu skeið í Føroyum.

Pauli Einarsson var leingi í starvi hjá fyrst Saga og síðani Norsk Hydro. Nú Saga varð yvirtikið av Hydro, sum seinni fekk tungu boðini um, at tað einki leitiloyvi hevði fingið í Føroym, varð avgjørt at lata aftur skrivstovuna í Føroyum, og Pauli gjørdist arbeiðsleysur.

Men ein av fremstu uppgávum hansara í starvinum hjá norsku oljufeløgunum var nettupp at kunna seg við mál, sum hava við heilsu, trygd og umhvørvi at gera og sjálvandi tí eisini tilbúgvingina.

Pauli Einarsson vísir á, at áðrenn eitt virksemi, sum kann elva til skaða á persónar, umhvørvi ella arbeiðstól, kann byrja, skulu ætlanir fyri neyðugari tilbúgving vera gjørdar. Ætlaninar skulu umfata gongdina í fylgjandi stigum: ávaring, niðurberjing, bjarging, burturflyting og normalisering.

– Hvør hevur ábyrgd av trygdini spyr hann! – Jú, tað hava vit øll, tí trygd er tað ein kann kalla linjuábyrgd. Hetta merkir, at ein leiðari, ið hevur ábyrgdina av onkrum virksemi, sum krevur tilbúgving, skal syrgja fyri, at ein tilbúgving verður sett á stovn og hildin viðlíka í samsvari við galdandi krøv.

### Taka tað sum eina sjálvfylgju

– Nógv verður tosað um heilsu, trygd og umhvørvi, men hvat merkir tað í sambandi við dagligdagin hjá hvørjum einstøkum á arbeiðsmarknaðinum ella heima við hús spyr Pauli og vísir á, at dagliga tonkja vit ikki so nógv um, at trygdin skal vera í lagi, tí tað verður roknað sum ein sjálvfylgja, at hesin parturin man vera í lagi. Tað, sum er mest umráðandi, tá tosað verður um trygd, er, at ein fyribyrgir at nakað kann seta heilsu, trygd ella umhvørvi í vanda. Nógv fyribyrgjandi tiltøk stava frá einari ella aðrari hending, sum hevur elvt til skaða, og út frá hesum er orðingin av tiltøkum skrivað.

Pauli Einarsson sigur, at vit hava altíð havt brúk fyri einum HTU politikki, men nú oljuvinan stendur fyri durum, kann hon verða tann, sum setur veruliga ferð á arbeiðið. Fyri at ein fyritøka skal vera góðkend sum veitari av vørum og tænastum til oljuvinnuna, verður hon noydd at lúka nøkur krøv. Herímillum er krav um, at fyritøkan skal hava ætlanir fyri vernd av heilsu, trygd og umhvørvi.

Pauli Einarsson sigur víðari, at samanbera vit fiskivinnu við oljuvinnu, so er oljuvinnan tann ídnaður, sum kann gera stórst skaða á menniskju og umhvørvi, um nakað stórt óhapp hendir í sambandi við boring ella framleiðslu. Tí eru krøvini, sum myndugleikarnir seta til oljuvinnuna nógv strangari enn til aðrar vinnur. Men ein veitari av vørum og tænastum til oljuvinnuna er at rokna sum ein partur av einari og somu vinnu. Tað er tí umráðandi, at føroysk virkir venja seg við, at hesi krøv vera sett teimum, og tí fáa orðað sínar egnu HTU-mannagongdir.